# Kjak

Zakarias Wang



## Enn eina-ferð

Johan Petersen roynir framvegis at snúgva sær undan at svara mínum einfalda spurningi um hvat ið hann hevði sagt um fólkaatkvøðuna 1946, um so var, at stjórnaruppskotið tá hevði fingið fleiri atkvøður enn loysing.

Men hann skal hava tøkk fyri at hann skrivar so nógv um hetta mál. Tað prógvar betri enn nakað annað, at tað er í tøkum tíma at eg havi gjørt keldusavnið um tað sum fór fram í tíðarskeiðinum frá september 1930, tá uppskotið kom fram um at hava fólkaatkvøðu í Føroyum um hvørt vit skuldu vera saman við Danmark ella ikki, og til fólkaatkvøðan varð hildin tann 14. september 1946.

Í hesum keldusavni ber til hjá einum og hvørjum at síggja svart upp á hvítt, hvat ið varð ført fram frá báðum síðum. Høgg verða ikki spard frá nakrari síðu. Jóhan Petersen kann har fáa ivaleyst tilfar at skriva um hetta mál so leingi hann livir, og tey sum eru ósamd við Jóhan, kunnu svara honum aftur um tey tíma.

Tað undrar meg bara, at Jóhan ikki enn hevur boðað frá, at hann vil gerast ein av stuðulunum til hesa útgávu. Tað kann væl ikki vera tí at hann er bangin fyri, at veruleikin ikki fer at koma honum so væl við?



*Høgni Hoydal*

## Uppskot til semju um valskipan í Føroyum

*Afturvendandi orrusturnar um valskipan drena orku og alt álit úr tingskipan og umboðandi fólkaræði. Her má gerast uppskot til sátt, ið savnar. Eina skipan, sum tekur fyrimunirnar úr báðum skipanum, og sum lúkar burtur vansarnar. Haldi, at niðanfyri lýsta uppskotið kundi verðið ein loysn*

Fátt hevur havt eginleikarnar at skilja so nógv sundur, sum broytingin í valskipanini frá sjey til eitt valdømi, og nú øvut. Løgtingið gekk tá – og aftur nú – í tveimum, nærum eins stórum bólkum. Flokkar eru spjaddir. Í orðaskiftinum og grundgevingunum verður høvuðstaðarøkið sett hvast uppímóti hinum økjunum í landinum. Kvinnur verða settar upp móti mannfólki. Egináhugamál verða sett uppímóti almannagagni og felagsáhuga. Ung ímóti eldri. Gamalt ímóti nýggjum. Lokalt ímóti lands og tjóðar. Nútímans ímóti ótíðar. Avmarking ímóti heild. Og so framvegis, og so framvegis.

Fólkaræðisliga viðgerðin, orðaskiftið og royndirnar at fáa breiða undirtøku, vóru ikki nøktandi, tá broytingin til eitt valdømi varð framd beint upp undir seinasta val. Tað vera vit at viðganga, sum tóku undir. Hetta skapti misálit, mótstøðu og sár, ið ikki fara burtur. Tað sama hendir nú, ið samtykt er við aðru viðgerð at fara aftur til sjey valdømi. Og tað fer at henda aftur, tá eftir øllum at døma vent verður aftur til eitt valdømi við triðju viðgerð við einum teprum meiriluta.

**_Tilvild, eykafólk, sjúka, forføll og hava avgjørt og kunnu aftur avgera ta valskipan, sum er høvuðstáttur í okkara fólkaræði._**

Tilvild, eykafólk, sjúka, forføll og hava avgjørt og kunnu aftur avgera ta valskipan, sum er høvuðstáttur í okkara fólkaræði.

Tí havi eg leingi hugsað um, hvørt tað ber til at gera eina skipan, ið savnar og kann vera varandi. Og sum hevur fyrimunirnar hjá og høvuðsgrundgevingarnar fyri bæði teirri skipanini við fleiri valdømum, sum vit kenna, og hjá skipanini við einum landsvaldømi.

Uppskotið er einfalt hetta:

1. Stillað verður upp í sjey økjum (tey gomlu valdømini).
2. Tað er frítt at velja tann, tú vilt, um alt landið og í øllum økjum.
3. Hvørt uppstilllingarøki er tryggjað eitt ella tvey umboð í part. Soleiðis, at tey fyrstvaldu í hvørjum øki verða gjørd upp fyrst. Altso 7 ella 14 tingfólk.
4. Restin av atkvøðunum verða gjørdar upp um alt landið eins og tað er við einum valdømi í dag.

Tryggjað verður við hesum:

- At økini stilla upp og fáa umboð, sum ikki er lutfalsliga dýrari ella bíligari enn onnur.
- At eit rættvíst býti verður í mun til fólkatalið og veljaratalið.
- At til ber at velja um alt landið, tann, tú vilt.
- At avlopsatkvøður í valdømum ikki fara fyri skeytið.
- At javnstøða og kvinnuumboðan hevur eins stóran møguleika.
- At øll øki í landinum hava møguleikan at fáa fleiri umboð, alt eftir veljarans tykki um flokk og politikara.

Havi roynt at fingið hetta uppskotið fram sum broytingaruppskot til 3. viðgerð av valskipanini í dag. Men orsakað av, at tað verður mett sum eitt heilt nýtt uppskot, kann tað ikki setast fram sum eitt broytingaruppskot til 3. viðgerð.

Uttan mun til, hvussu úrslitið verður, fari eg tó at virka fyri einum uppskoti sum hesum – og løgtingið hevur jú eisini samtykt, at ein endurskoðan skal gerast undir øllum umstøðum.

---



**Helena Dam á Neystabø**
*landsstýriskvinna í mentamálum*

## Arbeiðið at fyrireika Sandshøllina heldur fram

Við triðju viðgerð av uppskotinum til eykajáttanarlógina fyri 2010 samtykti Løgtingið í gjár at skerja játtanina, sum varð ætlað verkætlanini at byggja ítróttarhøll á Sandoynni.

Hetta var ein óheppin og kanska ikki nóg væl umhugsað avgerð.

Men lat ongan iva vera um, at tað verður farið undir verkætlanina í hesum ári. Projekteringin av høllini er komin væl áleiðis, og tá ið hon er liðug, verður farið undir at bjóða byggingina út. Eftir hetta verður besta og bíligasta tilboðið valt, og síðani verður farið til verka. Hvussu langt játtanin, sum kortini er eftir á fíggjarlógini røkkur, er ilt at meta um beint nú.

Men í heyst verður enn ein eykajáttanarlóg væntandi løgd fyri Løgtingið, og tá ber til at útvega neyðugu írestandi játtanina til verkætlanina. Verklagslógin er samtykt eins og tann samlaði fíggjarkarmurin.

Nú er at fara til verka við góðum treysti.